Løgreglan tiki› f‡ra ávirka›ar bilførarar

POLITITÍ‹INDI
Stefan í Skorini

Bæ›i í høvu›ssta›-num, Nor›oyggjum og í Su›uroynni hevur løgreglan kanna› bil-førarar og bilar um vikuskifti›.

Best stó› til í Klaks-vík, har eingin bilfør-ari var› tikin vi› kenn-ing, hóast løgreglan var úti alla leygar-náttina og gjørdi paragraf 13 kanningar. Fleiri bilar vór›u kanna›ir, men allir før-ararnir vóru edrúir.

Í Havn vór›u f‡ra førarar tiknir fyri at koyra ávirka›ir. Friggjanáttin var eitt ordiligt hál hjá løg-regluni, tá tríggir før-arar vór›u tiknir, me›-an ein var› tikin leyg-arnáttina. Í Su›uroy var ein førari tikin vi› kenning leygarnáttina.

Teir førarar, sum eru tiknir fyri at koyra ávirka›ir, hava enn ikki mist koyrikorti›. Løgreglan má bí›a til úrsliti› av bló›roynd-unum av førarunum eru komi› aftur úr Danmark, á›renn meira ver›ur gjørt vi› málini. Førararnir hava fingi› eitt fyribils koyrikort, me›an bí›a› ver›ur eftir úr-slitunum, men teir flestu kunnu vænta sær at koyrikorti› ver›ur tiki›.

Avhoyringar vanta framvegis

Tveir størri eldsbrunar hava veri› í Havn sein-astu dagarnar, men enn er løgreglan ikki kom-in á mál í kanningun-um, tí onkrar avhoyr-ingar vanta.

Sunnumorgunin klokkan 6 á morgni fekk løgreglan frábo›-an um eldsbruna í R.C. Effersøesgøtu. Løgreglan uppl‡sir, at einki illgrunasamt er vi› tí eldsbrunanum, men kanningararbei›i er enn ikki li›ugt.

Vi› Sundsvegin var eldur í einum sethús-um í seinastu viku, men heldur ikki í hes-um føri er kanning-ararbei›i li›ugt.

Reisingin fall

- Ska›arnir vóru smáir, tá hugsa› ver›ur um ta sera høgu vindstyrkina, sigur Kári Kjelnæs, lei›ari á Sløkkili›s-stø›ini í Klaksvík, sum hev›i nógv um at vera vi› at fyribyrgja stormska›um um vikuskifti›. N‡reista autistaheimi› stó› fyri skotum og fall

ÓDNARVE‹RI‹
Stefan í Skorini

Autistaheimi› var› reist í sí›stu viku, men nú liggur alt sum pinnabrenni. Byrjast má av n‡ggjum, tí bara grundin stendur eftir
Mynd: Jan Müller

N‡ggja autistaheimi› var› júst reist og Merki› var› vundi› í húnarhátt fyri fáum døgum sí›ani. Nú liggur alt í sori, og bara stoypta grundin stendur eftir.

Hetta var mest umfatandi ska›in í Klaksvík, sum stó›st av nógva vindinum um vikuskifti›. Høvu›s-uppgávan hjá sløkkili›num í hesum sambandi er at ska›afiksera ella at fyri-byrgja fleiri ska›um.

- Vit á sløkkili›num fóru oman á autistaheimi› at ska›afiksera har, tá alt koppa›i. Vit løgdu stórar betongklossar, i› viga eini tvey tons, á alt ta› leysa, sum lá og feyk í vindinum fyri at ta› ikki skuldi gera størri ska›a. Ta› er tó torført at arbei›a í so nógvum vindi og regni, sigur Kári Kjælnes.

- Har fór alt sum ta› var. Tvey hús stó›u li› um li› og flagga›u í sí›stu viku, men tey eru meira ella minni burtur nú og byrjast má umaftur. Ilt er at meta um, hvussu nógvur vind-urin var, men styrkin var sera ójøvn, og hvirlurnar kundu vera sera har›ar, sigur Kári.

Sløkkili›i› hevur annars veri› runt um ein stóran part av b‡num fyri at rudda leys ting upp, sum vindurin hevur tiki›. Ta› byrja›i í smáum vi› at onkur skúrur, sum stó› Ni›an Horn, fór á flog.

Nógv byggivirksemi er í b‡num, og tá liggur altí› nógv tilfar og rekst á byggiplássum. Fleiri tungir formar, sum ver›a n‡ttir til stoyping fóru í luftina.

Studio Pegasus fekk vitjan av eini skiftilast til lastbilar, sum lá leys. Hon kom at liggja beint uttan-fyri høvu›sdyrnar. Einki fólk var á sta›num, tá ta› hendi, men fleiri rútar vór›u knústir inn.

Ein ruskbingja hjá IRF fór á rull av nógva vind-inum. Ta› var um reppi›, at hon enda›i á nøkrum bilum. Var hon farin eina-fer› runt afturat, høvdu bilarnir ligi› undir.

Kári Kjelnæs sigur ann-ars, at nógv leys ting ligga og rekast, og ta› kann vera vandamiki›, tá ta› fer á flog. Serliga tá vindstyrkin er so høg sum hesufer›, tá tungar bingjur ver›a tiknar av vindinum. Tí skulu fólk hava í huga, tá nógvur vindur er, at taka leys ting inn og harvi› for›a fyri størri ska›a enn ney›ugt.

Nógvar vindska›ar eru frábo›a›ir um vikuskifti›. Bryggjan í Klakvík fekk eisini ska›a
Mynd: Jan Müller

R‡mdi frá óhappi

Leygardagin var› ein bilur ákoyrdur av eini knallert í Klaksvík. Drongurin á knallertini r‡mdi tó av sta›num, og førarin kundi ikki grei›a nærri frá, hvør sat á knallertini. Annars vóru eisini nøkur smærri fer›sluóhapp í Klaksvík, tó hendi eingin stórvegis ska›i.

Í Froskmannafelagnum í Klaksvík hava ótangar veri› uppá spæl friggja-náttina. Har var› herverk framt, og onkur rútur var› brotin.

SíS

Lá dey›ur í fleiri vikur

Ein 50 ára gamal ma›ur var› mikudagin í seinastu viku funnin dey›ur í heimi sínum.

Løgreglan vil ikki siga naka› um tí›arskei›i›, ma›urin hevur ligi› dey›-ur, men bara at ma›urin hev›i veri› dey›ur í eina tí›, tá hann var› funnin.

Ta› frættist annars, at ma›urin hevur ligi› dey›ur í ein gó›an mána› ella seks vikur, á›renn nakar varn-a›ist mannin.

SíS

Krevur grei›u á vi›urskiftunum

Á fundi hjá serligu 21 mannanevndini hjá Fólkatinginum í dag fer Óli Breckmann at krevja at fáa endaliga grei›u á stø›u forsætisrá›harrans til vi›urskiftini millum Danmark og Føroyar

FULLVELDISMÁLI‹
John Johannessen



Óli Breckmann

Serliga 21 mannanevndin hjá Fólkatinginum, sum hevur fylgt fullveldissam-rá›ingunum, hevur fund í dag klokkan eitt.

Føroyski fólkatingslim-urin, Óli Breckmann, ætlar sær at vera vi› á fundinum og fáa endaliga grei›u á stø›uni hjá Poul Nyrup Rasmussen til vi›urskiftini millum Danmark og Føroy-ar.

Óli Breckmann fer enn einfer› at spyrja forsætis-rá›harran, um hann metir Føroyar sum eina tjó›. Har-afturat fer Óli Breckmann at spyrja, hví forsætisrá›-harrin heldur fast uppá eina skiftistí› á f‡ra ár, um vit fara úr ríkinum, men ikki vil loyva okkum ein linier-an ni›urskur› í blokkstu›-ulinum, um vit ver›a ver›-andi í ríkinum.

Valdspolitikkur

Óli Breckmann heldur, at úrsliti› av samrá›ingar-fundinum millum lands-st‡ri› og donsku stjórnina hóskvøldi› s‡nir, at danski forsætisrá›harrin er farin undir valdspolitikk mót-vegis Føroyingum.

– Nyrup vil ikki missa Føroyar, og tí roynir hann at vera har›ur, fyri at vinna eina betur stø›u í Danmark, sigur vísir Óli Breckmann á.

Tí roknar Óli Breckmann heldur ikki at fáa naka› serligt burturúr fundinum í dag.

– Eg rokni vi›, at fundurin bert ver›ur ein fundur, har spælt ver›ur ping pong aftur og fram vi› ymsu argumentunum. Eg rokni ikki vi›, at fundurin fer at gera stø›una grei›ari millum londini, men heldur at grava skotgravirnar enn djúpari, sigur Óli Breck-mann.

Tá Sosialurin tosa›i vi› Jóannes Eidesgaard beint á›renn bla›i› fór til prent-ingar seinnapartin í gjár, var ikki greitt, um hann fór at luttaka á fundinum í Keypmannahavn í dag.

– Eg rokni ikki vi› at fáa naka› n‡tt at hoyra á fund-inum. Tí haldi eg ikki at ta› er ney›ugt hjá mær at fara til Keypmannahavnar at hoyra endurtøkur, seg›i Jóannes Eidesgaard.

Finna millumloysn

Óli Breckmann heldur, at nú samrá›ingarnar eru slitna›ar, eigur landsst‡ri› at royna at semjast um eina einfalda millumloysn, sum at enda merkir, at vit koma út úr ríkisfelagsskapinum.

– Heimast‡rislógin er einki anna› enn skinkl. Tí mugu vit royna at fáa eina n‡ggja skipan, so vit sleppa undan teimum mongu leysu endunum, sigur Óli Breck-mann.

Fólkatingsma›urin hjá Fólkaflokkinum heldur, at ta› hev›i givi› meining, um vit arbeiddu vi› einari fastlagdari skipan, i› hev›i eina javna gongd út úr rík-isfelagsskapinum. Hetta var eisini nøkulunda ta›, sum danski forsætisrá›-harrin leg›i upp til á sam-rá›ingarfundinum í Keyp-mannahavn hósdagin. Men forsætisrá›harrin vildi ikki gó›taka Føroyar sum tjó›, fyrr enn vit eru komin so lagt, at vit eru uttan fyri ríkisfelagsskapin.

Maersk Air arbei›ir vi› farmarutu til Føroya

Maersk Air hevur ætlanir um at flúgva vi› farmaflogførum til Føroya. Ætlanin er grunda› á føroyska fiskaútflutningin

FARMARUTA
Edvard Joensen

Maersk Air arbei›ir vi› at seta á stovn fraktrutu mill-um Vágar og Kastrup. Gó›u fiskaprísirnir skulu vera grundarlagi› undir rutuni.

Keld Moesgaard Christ-ensen, rutulei›ari hjá Maersk Air, sigur, at ætlan-in ikki er komin longri enn á teknibor›i›. Men ver›ur naka› burtur úr ætl-anini, ver›ur væntandi flogi› tvær fer›ir um vik-una á hesi n‡ggju rutuni í byrjanini, sigur Keld Moes-gaard Christensen. Men sum skilst, metir hann, at tørv-urin er so miki› stórur, at flúgvingin kann ví›kast, nær ta› skal ver›a.

Keld Moesgaard Chris-tensen sigur vi› Sosialin, at Maersk Air ikki í løtuni hevur flogfør tøk, men at arbeitt ver›ur vi› at finna flogfør, sum kunnu leigast til endamáli›. Ta› ver›a Boeing flogfør, talan ver›-ur um. Helst 737, sum er ta› slagi›, felagi› í løtuni n‡tir á føroyarutuni, sigur Keld Moesgaard Christen-sen.

Hann metir, at batnandi føroyski búskapurin fer at hava øktan farmaflutning vi› sær. Bá›ar vegir. Og tann óhoyrdi fiskaprísurin í løtuni ger sítt til, at Maersk Air hevur vónir um, at ta› fer at bera til at flúgva vi› fiski úr Føroyum, skilst.

»Men ætlanin er bara á fyrireikingarstø›i enn«, tekur Keld Moesgaard Christensen, rutulei›ari hjá Maersk Air, aftur í aftur.

1000

orsøkir at ferðast við MAERSK AIR

petur og petur 320 870

1000 kr. av vanliga APEX-prísinum

Frá 23. oktober til og við 10. desember 2000 ber til at ferðast bíliga til og úr Føroyum. Forsølan er frá 16. oktober til 3. desember 2000. Treytin er at tvey ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Føroyar - Danmark
(Keypmannahavn ella Billund)
ella
Danmark - Føroyar
og aftur 1)

Fyri hvønn
1500,-
+ ferðaavgjøld

Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%

1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.

Haldið jól í Danmark við MAERSK AIR

Frá 8. desember 2000 til og við 7. januar 2001 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Forsølan er frá 1. november til 11. desember 2000. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Føroyar - Danmark
(Keypmannahavn ella Billund)
og aftur 2)

Fyri hvønn
1250,-
+ ferðaavgjøld

Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%

2) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðin skal vara millum 7 og 21 dagar. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.

MAERSK AIR